# Hárnetið er ytt!

**Senta søkir eftir netumsitara/netráðgeva til tænastudeildina.**

*Leingist tær eftir spennandi uppgávum? Kundi tú hugsað tær betri persónliga menning?*
*Vilt tú hava eitt starvspláss, sum yður í møguleikum til tín? So ert tú vælkomin í SENTA.*

**Arbeiðsøkið**
Tú fert at virka í einum góðum og spennandi starvi sum netumsitari og ráðgevi, har tú sum partur av tænastudeildini setir upp og viðlíkaheldur netútgerð og ráðgevur vinnulívskundum okkara um keyp og rakstur av KT-kervum. Tú fert at arbeiða við merkjum sum Dell, HP, CISCO, EMC og Microsoft.

**Tú**
Tú ert álítandi, fyrikomandi og hevur hug at taka við spennandi avbjóðingum. Best er, um tú ert t.d. datamatikari, IT-supportari, datafakteknikari, veikstreymsverkfrøðingur ella hevur Microsoft-certificering, Cisco-certificering ella tilíkt prógv. Ein treyt er eisini, at tú hevur minst trý ára royndir á økinum.

**Vit bjóða**
Vit bjóða tær eitt gott starv í væl skipaðum umstøðum, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum fært høvi at ávirka innihaldið í tínum arbeiðsdegi. Løn og setanartreytir sambært førleikum og avtalu.

**Forvitin?**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin seta teg í samband við Árna Elttør, deildarleiðara fyri ráðgeving og tøkni, á tlf. 77 61 62 ella ael@senta.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Senta, HR Deildin, Postboks 109, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi áðrenn **3. desember 2007**.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Senta er samanrenningin av Com-Data, Farodane, og Atlants Tøkni og er ein framsøkin fyritøka, sum grundar virksemi sítt á opinleika, áræði, førleika og passión. Vit vilja í øllum lutum útvega kundum okkara í Føroyum og uttanlands eina betri stýring og harvið ein størri vinning í gerandisdegnum, bæði fíggjarliga, tøkniliga og umsitingarliga.*

*Missiónin hjá Senta er at gera kunningar- og samskiftistøkni møguliga og lætt atkomuliga fyri øll, so at hon gerst ein jalig uppliving hjá brúkaranum og ein fyrimunur hjá virkjum at nýta.*

*Senta hevur deildir í Tórshavn, Saltangará og Klaksvík og veitir teldutøkni, KT-skipanir, ráðgeving og tøknitænastur til vinnulívið. Hjá Senta starvast uml. 70 fólk.*

REPROZ

SENTA®
BETRI STÝRING. STØRRI VINNING.

NEMA Senta er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.

# Gev tær sjálvum eini góð ráð

**Senta søkir eftir sølu- og kundaráðgeva innan telduútbúnað og KT-loysnir.**

*Tørvar tær avbjóðingar? Kundi tú hugsað tær betri møguleikar fyri persónligari menning?*
*Vilt tú royna tínar førleikar á nýggjum økjum? So ert tú vælkomin í SENTA.*

**Arbeiðsøkið**
Arbeiðsøki títt fevnir um ráðgeving og sølu av telduútbúnaði og KT-loysnum til vinnukundar okkara. Tú fært eitt professionelt arbeiðsumhvørvi, verður up-do-date í kunningartøkni og fert at arbeiða við kendum og vælumtóktum merkjum sum Dell, HP, Toshiba, SUN, Apple, Canon, Cisco, Sony, Casio, Microsoft, EMC o.ø.

**Tú**
Tú ert fyrikomandi og álitisvekjandi, dugir at samskifta á skrift og í talu, vilt royna nýggjar avbjóðingar, og so dámar tær sjálvandi væl at ráðgeva kundum. Tú hevur eisini hollar royndir í sølu og tænastu og eitt breitt innlit á KT-økinum. Viðkomandi útbúgving er avgjørt ein fyrimunur.

**Vit bjóða**
Vit bjóða tær eitt gott starv í væl skipaðum umstøðum, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum fært høvi at ávirka innihaldið í tínum arbeiðsdegi. Løn og setanartreytir sambært førleikum og avtalu.

**Forvitin?**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin seta teg í samband við Heina Hansen, deildarleiðara fyri KT-loysnir, á tlf. 77 61 78 ella hha@senta.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Senta, HR Deildin, Postboks 109, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi áðrenn **3. desember 2007**.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Senta er samanrenningin av Com-Data, Farodane, og Atlants Tøkni og er ein framsøkin fyritøka, sum grundar virksemi sítt á opinleika, áræði, førleika og passión. Vit vilja í øllum lutum útvega kundum okkara í Føroyum og uttanlands eina betri stýring og harvið ein størri vinning í gerandisdegnum, bæði fíggjarliga, tøkniliga og umsitingarliga.*

*Missiónin hjá Senta er at gera kunningar- og samskiftistøkni møguliga og lætt atkomuliga fyri øll, so at hon gerst ein jalig uppliving hjá brúkaranum og ein fyrimunur hjá virkjum at nýta.*

*Senta hevur deildir í Tórshavn, Saltangará og Klaksvík og veitir teldutøkni, KT-skipanir, ráðgeving og tøknitænastur til vinnulívið. Hjá Senta starvast uml. 70 fólk.*

REPROZ

SENTA®
BETRI STÝRING. STØRRI VINNING.

NEMA Senta er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.

# Fylg ikki bara við streyminum

**Senta søkir eftir veikstreymsteknikara til tænastudeildina.**

*Vilt tú bjóða tær sjálvum av? Kundi tú hugsað tær betri møguleikar fyri persónligari menning?*
*Vilt tú geva tær sjálvum ein stoyt tann rætta vegin? So ert tú vælkomin í SENTA.*

**Arbeiðsøkið**
Tú fært eitt spennandi og avbjóðandi tøkningastarv á verkstaði okkara, har tú sum partur av tænastudeildini setir upp og umvælir kopimaskinur, telduútbúnað og aðra tøkniliga útgerð. Tú fert at arbeiða við kendum og vælumtóktum merkjum sum Dell, HP, Toshiba, Apple, SUN, Canon, KonicaMinolta, Sony, Casio o.ø.

**Tú**
Tú ert fyrikomandi og álítandi, til reiðar at taka við nýggjum avbjóðingum og veitst einki betri enn at arbeiða við teknikki. Tú ert útbúgvin sum eitt nú elektronikkmekanikari, veikstreymsverkfrøðingur, datamekanikari ella tilíkt, og ein treyt er eisini, at tú hevur minst trý ára royndir at umvæla tøkniliga útgerð.

**Vit bjóða**
Vit bjóða tær eitt gott starv í væl skipaðum umstøðum, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum fært høvi at ávirka innihaldið í tínum arbeiðsdegi. Løn og setanartreytir sambært førleikum og avtalu.

**Forvitin?**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin seta teg í samband við Árna Elttør, deildarleiðara fyri ráðgeving og tøkni, á tlf. 77 61 62 ella ael@senta.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Senta, HR Deildin, Postboks 109, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi áðrenn **3. desember 2007**.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Senta er samanrenningin av Com-Data, Farodane, og Atlants Tøkni og er ein framsøkin fyritøka, sum grundar virksemi sítt á opinleika, áræði, førleika og passión. Vit vilja í øllum lutum útvega kundum okkara í Føroyum og uttanlands eina betri stýring og harvið ein størri vinning í gerandisdegnum, bæði fíggjarliga, tøkniliga og umsitingarliga.*

*Missiónin hjá Senta er at gera kunningar- og samskiftistøkni møguliga og lætt atkomuliga fyri øll, so at hon gerst ein jalig uppliving hjá brúkaranum og ein fyrimunur hjá virkjum at nýta.*

*Senta hevur deildir í Tórshavn, Saltangará og Klaksvík og veitir teldutøkni, KT-skipanir, ráðgeving og tøknitænastur til vinnulívið. Hjá Senta starvast uml. 70 fólk.*

REPROZ

SENTA®
BETRI STÝRING. STØRRI VINNING.

NEMA Senta er partur av NEMA, ið er størsta KT- og samskiftissamtak í Føroyum og veitir fullfíggjaðar tænastur innan KT, skrivstovuútgerð og samskifti.